Sjúkrarøktarfrøðingur til Hvíldarheimið Naina

Vit sóknast eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi á starvsbrøki umleið 0,8 í skiftandi vaktum til setan 1. mars 2003.

Starvið er lønt sambært sáttmála hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ásu Kiærbech Olsen, fyristøðukvinnu, telefon 311840.

Umsóknarfreistin er 22. januar 2003.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

Hvíldarheimið Naina
Att: Fyristøðukvinnan
Gundadalur 7
100 Tórshavn

Almennir fundir

hjá Hvannasunds Bygdaráð 2003

verða á kommunuskrivstovuni hesar týsdagar kl. 18.00:

21. januar
18. februar
18. mars
8. apríl
20. mai
17. juni
30. september
28. oktober
25. november
16. desember

Fundirnir verða hildnir á kommunuskrivstovuni.

Yvirlit yvir tey mál, sum koma fyri á fundi, eins og úrrit úr gerðabókini fyri síðsta fund, verða lødg fram á kommunuskrivstovuni til alment innlit 3 dagar áðrenn fundin. Fyrilit verða tikin fyri reglum um tangarskyldu.

Mál, sum skulu viðgerðast á kommunustýrisfundi, skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fundin.

Kommunuskrivstovan er opin hesar tíðir:

Mánadag-mikudag	kl. 13.00-16.00
Hósdag	kl. 14.00-18.00
Fríggjadag	kl. 08.00-11.00

Hvannasunds Bygdaráð

Vága Sjúkrakassi

Limagjaldið fyri 2003 er 220 kr. um mánaðin.

Vága Sjúkrakassi
360 Sandavágur

Sethús í Hoyvík

Frálík sethús við góðum útsýni og í barnavinarligum umhvørvi á Djúpagilsvegi 16 til sølu. Bilhús er eisini til 2 bilar.

Húsini eru í tveimum hæddum til víddar umleið 110 m² hvør umframt hjallur 8 m².

Grundøkið er 600 m².

Í ovaru hæddini er køkur, stova, 3 kømur, wc, bað og gongd/trappa til niðaru hæddina, sum er partvís innrættað, men væl hóskandi til at gera íbúð ella kømur í.

Húsini, sum eru frá 1984, eru í góðum standi.

Nærri fæst at vita við at ringja til

Demmus Hentze, lrs,
og Turið Debes Hentze, advokat
E. Jalsgøta 1, 100 Tórshavn, tlf. 311460

Góðir brúktir bilar

Nissan Almera 2,0 Diesel GX grønur, 5 hurðar, árg. 1996. **89.000**	**Opel Astra 1,7 DT Van** bláur, 5 hurðar, árg. 1998, 82.000 km. **78.000**
Nissan Primera 1,6 A/C reyður, 4 hurðar, árg. 1998, 70.000 km. **125.000**	**Opel Astra 2,0 DT** grønur, 5 hurðar, árg. 2001, 38.000 km. **175.000**
Peugeot 106 Diesel gráur, 3 hurðar, árg. 1999, 60.000 km. **85.000**	**Opel Vectra 1,8** svartur, 4 hurðar, árg. 1996, 80.000 km. **122.000**
Peugeot 306 Diesel 1,9 AC bláur, 4 hurðar, árg. 1999, 61.000 km. **125.000**	**Opel Vectra 1,7 Diesel** reyður, 4 hurðar, árg. 1995, 118.000 km. **76.000**
Peugeot 306 DT 1,9 bláur, 4 hurðar, árg. 1997, 150.000 km. **90.000**	**Saab 9-3 TDi** bláur, 5 hurðar, árg. 2000, 67.000 km. **208.000**
Peugeot 406 ST 2,0 Hdi vínreyður, 4 hurðar, árg. 1999, 120.000 km. **164.000**	**Audi A4 Tdi** bronze, 4 hurðar, árg. 1995, 135.000 km. **130.000**
Opel Astra 1,7 DT brúnur, 4 hurðar, árg. 1996. **75.000**	**Ford Courier 1,8 Diesel Van** hvítur, 3 hurðar, **78.000**
Opel Astra 2,0 DTi svartur, 5 hurðar, árg. 1999, 36.000 km. **138.000**	**Ford Escort 1,8 Diesel** grønur, 4 hurðar, árg. 1995, 152.000 km. **65.000**

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Avloysari fyri setursskrivara

Av tí at ov fáar umsóknir komu inn í fyrsta umfari, verður søkt umaftur eftir barnsburðaravloysara fyri setursskrivaran á Fróðskaparsetri Føroya frá 1. februar til umleið 1. oktober 2003. Setursskrivarin hevur leiðsluna og ábyrgdina av Setursskrivstovuni, sum er miðfyrisiting Fróðskaparsetursins.

Uppgávurnar hjá Setursskrivstovuni eru nógvar og fjølbroyttar og fevna m.a. um: fíggjarmál, starvsfólkamál, almennar fyriskipanir og reglur fyri stovnin, langtíðar ráðlegging, hølismál, tilrættalegging og uppfylging av setursráðsfundum, samskifti við miðfyrisiting landsins, samskifti og samstarv við aðrar stovnar og universitet, felags tiltøk, kunning og samskifti yvirhøvur.

Umsøkjarar skulu hava útbúgving frá hægri lærustovni. Fyrimun hevur tann, ið hevur arbeiðsroyndir í almennari fyrisiting. Umráðandi eru góð samstarvsevni og sjálvstøugt arbeiðslag.

Starvið verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi akademikarafelag. Starvið er ikki endaliga flokkað, men verður fyribils lønt sum deildarleiðarastarv.

Umsókn við curriculum vitae, próvskjølum og møguligum viðmælum skal stílast til rektaran og vera Fróðskaparsetrinum í hendi í seinasta lagi 20. januar 2003, kl. 12.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Anniku Sølvará setursskrivara á tel. 352500 ella teldupost annikas@setur.fo

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan
J.C. Svabos gøtu 14
Postrúm 272
110 Tórshavn

Fróðskaparsetrið er sjálvsognarstovnur, ið hevur til endamáls at inna gransking, geva frálæru á hægri stigi og breiða út kunnleika um vísindalig háttaløg og úrslit. Umleið 55 fólk starvast í løtuni á Fróðskaparsetrinum og teimum stovnum og verkætlanum, sum Setursskrivstovan fyrisitir.

Setrið hevur tríggjar megindeildir: Føroyamálsdeild, Søgu- og samfelagsdeild og Náttúrurvísindadeild. Fyrisitingin av stovninum liggur hjá Setursskrivstovuni, sum stendur beinleiðis undir rektaraembætinum. Umframt hetta liggur fyrisitingin av fleiri eksternum verkætlanum, Stovnunum á Debesartroð og Altjóða Skrivstovuni eisini hjá Setursskrivstovuni. Umframt rektaran og setursskrivaran starvast í løtuni 5 fólk á Setursskrivstovuni.

Haldarar hjá Dimmalætting og Sosialinum,

sum ikki fáa leygardagsbløðini, verða biðin um at ringja tlf. 253497 leygardag millum kl. 11 og 14

Prentmiðstøðin

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

NISSAN PATROL 3.3 TD
árg. 88, styttra modellið, nýsýnaður. Prísur 49.000 kr.
Tlf. 217317

TOYOTA DYNA 150
árg. 1990. Sýnaður december 2002.
Tlf. 333488

PÍKADEKK
Næstan óbrúkt píkadekk, 185 x 65. 15 tumma, bíliga til sølu.
Tlf. 444383

YNSKIST
Gearkassi + koblingshús komplet ynskist til Ford Escort 1.6 Zeta, árg. 1997.
Tlf. 310341 ella 212236

VW PASSAT
station T, diesel, galvaniseraður, koyrt 64.600 km, frá 01/98, sýnaður 27/9-02. Havt 60.000 km eftirlit 13.11.02. Til sølu vegna flyting.
Tlf. 311861, e. kl. 20.00

TOYOTA COROLLA 1600
árg. nov. 84, koyrir væl, til sølu.
Tlf. 328050

MITSUBISHI GALANT 2.0
árgang 02/92 til sølu um hóskandi boð fæst. Sýnaður 12/02. Km. 170.000 - 245 HK
Tlf. 22 08 50

EYKALUTIR
til Toyota Hiace árg. 88, góða rattstammu, varmaapparat, gløðirelé o.a. Bíliga til sølu.
Tlf. 210560

FELGUR TIL SØLU
Fýra 15" felgur við dekkum til Nissan Bluebird 600,-. Fýra 14" felgur til Ford Escort 800,- Fýra 13" felgur og dekk til Ford Escort 800,- Fýra felgur til Toyota Hiace 400,-
Tlf. 210560

FORD ESCORT 1.6
árg. 88 til sølu sum eykalutur. Dømi: Flotta kabinu (setur), rútar, kolara, útstoyt nýtt. 14" sportfelgur og vel. Startara, dynamo o.a. bíliga til sølu.
Tlf. 210560

FORD SIERRA
árg. 87, nýsýnaður, í góðum standi, til sølu fyri 8.000 kr. ella um hóskandi boð fæst.
Tlf. 228347

DEKK TIL SØLU
4 stk. lítið brúkt píkadekk, stødd 205/70-15 á felgum + skálir, passar til Kia Carnival, selist bíliga.
Tlf. 213802 ella 313802

TIL SØLU
4 heilárs lameldekk við felgum 175/65 - R14 til Toyota Yaris. Skálir eru eisini til fyri einans kr. 1.500,-
Tlf. 313168

NISSAN PATROL 3.3 TD
árg. sept. 85, sýnaður mai 02. Boð yvir 33.000 hevur áhuga. Bilurin er í sera góðum standi.
Ring 228707

TIL SØLU
Fýra stk. felgur passa til Toyota Carina E.
Tlf. 222241

MITSUBISHI PAJERO 1988
við setrum aftan. Lakeraður og botnviðgjørdur des. 02.
Tlf. 222241

SAAB 900I YNSKIST
Í góðum standi, uml. 9 ár. Kann háva ein skaða ella defektan motor.
Tlf. 423572/210560

FORD ESCORT 16 - 2 HURÐAR
ynskist bíliga til keyps, uml. 1.500 kr.
Tlf. 210560

FELGUR
4 felgur til Toyota Haice, árg. '89, 4 dekk 15x185 bíliga til sølu.
Tlf. 210560/423572

TIL SØLU
Nýtt útstoyt, komplet til Ford Escort, árg. '89 o.l. startari, dynamo o.a.
Tlf. 210560

TIL SØLU
4 sportfelgur til Bluebird T12 til sølu fyri 1.000 kr. Elrútavindari v/f hurð o.l. sentrallás fyri 400 kr.
Tlf. 210560

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Honda Accord 2,0 114 hk, árg. '91. Bilurin er í sera góðum standi. Hevur powerstýring, centrallás, elrútar, el-spegl og er væl skoddur. Prísur: 30.000,- (uml.) Ring og gev eitt boð.
Tlf. 224001

PEUGEOT 306 HDI
árg. april 2000. Bilurin er sum nýggjur.
Tlf. 423495 ella 222154

FORD ESCORT SAVOY
árg. 88 bíliga til sølu. 1/2 ára gamalt stereo-anlegg. Nývirði 8.000,- + eyka felgur við píkum fylgja við. Okkurt smávegis at gera við.
Tlf. 224058

TOYOTA COROLLA 1.6
árg. 09/87 hvítur, til sølu fyri 8.000 kr. Koyrir væl, men krevur smávegis ábøtur, sýnaður juni 2002. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 312602

Amboð

ELECTRA BECKUM
Kombinerað borð-kappingarsag KGT 500 til sølu fyri 6500,-
Tlf. 722018

Arbeiði

SØKT VERÐUR EFTIR
álítandi fólki til reingerðing 2-3 ferðir um vikuna í Havn, helst fyrrapart.
Tlf. 215778

REINGERÐ Í VÁGI
Er tað nakar sum vil gera reint fyri okkum hvønn friggjadag uml. 2 tímar.
373360 ella 261138

REINGERÐ
Søkt verður eftir fólki at gera reint í Sjónleikarhúsinum í Havn uml. 5 tímar um vikuna og eftir tørvi í sambandi við tiltok. Áhugað kunnu ringja á tlf. 218899.
Havnar Sjónleikarfelag

TILBOÐ YNSKIST
uppá at klæða eini betonghús í Havn í vár/summar.
Tlf. 317234

TILBOÐ YNSKIST
Biðið verður um tilboð upp á arbeiði at stoypa húsagrund og garð á grundstykki í Hoyvík. Arbeiðið kann byrja beinanvegin.
Ringið telefon 319000

EIN 40 ÁRA GAMAL
raskur sjómaður ynskir at sleppa við sum dekkari á línubáti – er vanur. Eri í Suðurey.
Ring 225600

ARBEIÐI SØKIST
Tilkomin kvinna, sum kundi hugsað sær arbeiði sum hjálparfólk í barnagarði frá 1. januar. Havi royndir.
Tlf. 228408

Barnaansing

HEY!
Eg eri ein 9 mánaðar gomul góð og still genta, sum manglar onkran at passa meg sum skjótast. Heima ella úti eftir ynski.
Ring 223727 ella 320820

BARNAANSING
Søkt verður eftir gentu/konu at ansa 16 mðr. gomlum dreingi gerandisdagar frá síðst í januar. Alt hevur áhuga.
Ring 317234

Barnaútgerð

BARNAVOGNUR YNSKIST
Er tað nakar, ið kann selja mær ein Silvercross barnavogn. Vinarliga ring á
tlf. 318906 ella 218906 eftir kl. 14

SIMO KOYRISTÓLUR
Myrkabláur Simo koyristólur við posa. Reg. handtak, alustell. Til sølu fyri 2800 kr. Nýprísur 4900 kr.
Tlf. 455918 ella 265418

NÝGGJUR KOYRISTÓLUR
av merkinum Britax fyri ca. 1.000 kr. Góðkendur upp til 13 kg.
Tlf. 222851 ella 315261

YNSKIST TIL KEYPS
Eg leiti eftir brúktum barnavogni. Skal bert nýtast at sova í, so alt hevur áhuga. Eisini søknist eg eftir einum koyriposa (skinn ella annað) til koyristól.
Ring 317234

MYRKABLÁUR KOYRISTÓLUR
av slagnum Condor til sølu fyri 1400 kr. brúktur til eitt barn. Bilstólur 0-18 kg. til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 227363

BRIO KOMBIVOGNUR
við lyft, koyriposa og puslitasku til sølu. Alt sera væl hildið.
Tlf. 310384 ella 261686

TIL SØLU
Barnavognur úr Skemmuni til sølu fyri 2.000 kr. Nýprísur 2.750 kr. Lítið brúktur. Alt tilhoyr fylgir við.
Tlf. 321265 ella 253491

Bátaútgerð

BJARGINGAR- & SLØKKIÚTGERÐ
Neyðrakettir og hondbluss eru á goymslu.
Kaj Andreasen & Co. tlf. 315600

KØBES
Redningsflåde 4 pers.
Tlf. 228058

GLASFIPURBÁTUR
úttan fiskiloyvi ynskist til keyps fyri sámuligan prís.
Tlf. 316951

Bingo

BINGO
verður í Støkkhøllini týsdagin 7. jan. kl. 19.30.
Eldrafelagið Nón, Saltangará

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hóskvøldið 9.1.03. Nógvir góðir vinningar, millum annað á lutaseðli 2 x 500 kr. Balja full av mati, eykaspæl, koyring heim aftaná.
AB-Stuðlar

Burturm. /funnið

LYKIL BURTURMISTUR
Lykil av merkinum Opel. Ein Ruko lykil og ein lykt hekk eisini í. Um nakar hevur funnið hann, vinarliga ringið
tlf. 315261 ella 222851

BURTURMIST Í SMS
Plastikkposi við einum gávupakka í. Í pakkanum eru eitt par av Adidas inniskóm. VInarliga ring, tú sum funnið hevur.
Tlf. 449089

HUNDAREIM
funnin í Sandagerði í november mánaða. Ring á
tlf. 31 14 30

Býli

3 RÚMS ÍBÚÐ YNSKIST
Par við einum barni, 1 ár, ynskja íbúð í Tórshavn frá 1. mars 2003. Má hava 2 kømur.
Tlf. 0045 86420452/ 29456457

ÍBÚÐAR NEYÐARRÓP!
Er tað nakar, sum kann framleiga/leiga okkum eina íbúð í KBH-umráðnum frá feb. til ca. mai mánað. Vit eru eitt par, sum fara væl um.
Tlf. 258485 ella 314640

EINLIG MAMMA
við góðum starvi, søkir íbúð í Havn sum skjótast. Alt hevur áhuga.
Tlf. 252080 ella 0045 27205138

KAMAR TIL LEIGU
atgongd til matgerð, wc og bað, egin inngongd.
Tlf. 312026

ÍBÚÐ YNSKIST
Ung kvinna í føstum starvi søkir íbúð.
Ring 224040

NEYÐARRÓP!
Hús ella íbúð ynskist til leigu sum skjótast, min. 3 kømur.
Tlf. 315754 ella 255754

KAMAR TIL LEIGU
á Argjum beinanvegin. Atgongd til nýggjan køk, baðverilsi, sjónvarp og vaskimaskinu.
Tlf. 213571

EG ERI
ein eldri dama ið manglar eina íbúð ella eini lítil hús til leigu ella til keyps.
Tlf. 282458

AMAGER!
Íbúð ella kollegiekamar ynskist til framleigu frá februar til mai. e-mail: asadanielsen@hotmail.com Vinarligast ringið á
tlf. 250466 ella 251291

ÍBÚÐ YNSKIST
3 rúms íbúð ynskist – par við einum barni, 1 ár, ynskir íbúð til leigu í Tórshavn frá 1. mars 2003. Má hava 2 kømur. Tlf. 0045 86420452/ 29456457/
andreaspetur@hotmail.com

KAMAR TIL LEIGU
Stórt kamar til leigu við fullari atgongd til køk, bað og stovu frá 29.12. til 09.02. Húsini liggja væl fyri í Tórshavn.
Tlf. 222850

KOLLEGIEKAMAR TIL FRAMLEIGU
Moblerað kamar til framleigu á Amager frá 1. jan. 03 til 1. aug. 03. Leigan er 1600 kr./mðr. og innskot 3.200 kr.
Tlf. 318133, e. kl. 18

KAMAR TIL LEIGU
í vesturbýnum v/ atgongd til køk, bað og vaskimaskinu.
Tlf. 221158 - 313799

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn.
Tlf. 264256

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig kvinna við 3 børnum søkir íbúð frá 1. jan. 2003 – helst í miðstaðarøkinum.
Tlf. 262161 eftir kl. 18.00

ÍBÚÐ TIL KEYPS
56 ára gomul kvinna søkir íbúð til keyps í Havn.
Tlf. 315036 el. 213034 eftir kl. 18.00

HÚS ELLA ÍBÚÐ Í TÓRSHAVN
Hava tit okkurt at bjóða mær, gleði eg meg at hoyra frá tykkum. Eg eri álítandi, gjaldi til tiðina og royki ikki. Havi eisini fast starv.
Tlf. 317724 eftir kl. 16 ella 258833 Dagbjørg Hja

ÍBÚÐ SØKIST
Einlig tilkomin kvinna søkir íbúð í Havn frá 1. januar.
Tlf. 228408

Dýr

KETTLINGAR
Tveir kettlingar, ein gráur og hvítur og hin svartur og hvítur fáast.
Tlf. 421527

BLANDAÐUR HESTUR
7 ára gamal, til sølu.
Tlf. 311861, e. kl. 20.00

ÍSLENDSK RYSSA
20 ára gomul, til sølu.
Tlf. 311861, e. kl. 20.00

KETTLINGAR
3 sera fittir kettlingar verða latnir djóravinum.
Tlf. 457638

TIL SØLU
Gásarpar til sølu.
Tlf. 444774

HEY!
Vit hava nakrar fittar dvørghamstrarar til sølu fyri 30 kr. stk. Ring
tlf. 319028. Best e. kl. 17

DVØRGHAMSTRARAHÚS
til sølu. Er heimagjørt og er sera flott.
Tlf. 256900

VEGNA FLYTING
kunnu 2 border collie hvølpar fáast. Ein er 1/2 ára gamal og ein 3 mðr. Bert til djóravin.
Tlf. 315811

UNDULATUR
Sera fittur og elskiligur 1 ára undulátur + búr til sølu fyri 50 kr. Hann má sleppa at flúgva av og á.
Hildur, tlf. 314500

HUNDAHVØLPUR
Ein fittur brúnur puddil hundahvølpur, 12 vikur gamal, verður latin djóravini.
Tlf. 361687

HEY HEY!
Er tað nakar, sum hevur eitt hamstrarabúr til sølu.
Ring á tlf. 255319 ella 318708

Fundir

SUNDA PENSIONISTAFELAG
Hugnakvøld verður í Eydnuni á Oyrarbakka mánakvøldið 13. januar kl. 19.00.
Nevndin

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

Lýsingartorgið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki